

*Fleiri hús eru bygd í Runavíkar kommunu seinasta árini. - Ein ávís bygging er í øllum bygdum í kommununi, sigur býráðsformaðurin, Rodmundur Nielsen.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Runavík við at gerast messubýur

**- Tað er okkum ein gleði at bjóða gestum bæði nær og fjar higar at síggja, hvat kreativ fólk her á staðnum kunnu megna at reisa á føtur, sigur Rodmundur Nielsen, býráðsformaður**

STEVNUR OG BYGGING
*Vilmund Jacobsen*

Seinnu árini eru sølustevnurnar, sum javnan verða hildnar her heima á klettunum, í størri og størri mun farnar at bera dám av messum, soleiðis sum vit kenna tær uttanlands.

Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavíkar kommunu, dylur ikki, at hann er errin av, at bústevnan, Hús og Innbúgv, sum verður komandi vikuskiftið, verður hildin í Runavík.

## Stevnudepil

- Eg haldi, vit kunnu siga, at okkara kommuna er farin at líkjast einum depli fyri stevnur og messur. Bústevnan er bara ein av eftirhondini fleiri í Runavík seinastu árini, tann stóra fiskarímessan verður eitt nú eisini hildin í Runavík.

Rodmundur sigur, at hesi stóru og umfatandi tiltøk í kommununi eru vorðin til, tí her búleikast kreativ fólk.

- Tey tosa ikki so nógv um tað, tey gera, men gera tað bara, sigur býráðsformaðurin.

Hann sigur seg vera errnan av, at fólk eru í kommununi, sum hætta sær undir so stór tiltøk, sum slíkar stevnur í veruleikanum eru.

- Tað er okkum ein gleði at bjóða gestum bæði nær og fjar higar at síggja, hvat fólk her á staðnum kunnu megna at reisa á føtur, sigur Rodmundur.

Hann vónar, at teir lunnar, sum eru lagdir, fara at geva stigtakarum mót til at halda fram.

- So leingi, fólk seta føtur undir egið borð, verður ein slík stevna, sum bústevnan, altíð áhugaverd at vitja, sigur býráðsformaðurin.

## Nógv bygging

Runt um í Runavíkar kommunu standa eini 15-20 hús í gerð í løtuni.

Rodmundur sigur, at ein ávís bygging fer fram í at kalla øllum bygdum í kommununi, bæði í Æðuvík, Rituvík, Saltangará, Lamba og Søldarfirði.

- Á Høgaleiti, har nógv bygging hevur verið, standa fleiri hús í gerð og somuleiðis millum Runavík og Saltangará.

Hann sigur, at á Høgaleiti eru fyribils 12 grundøkir eftir. Hesi eru ikki seld enn, men verða væntandi klár tíðliga í summar.

- Eini 40-50 fólk, sum ætla sær at seta búgv í kommununi, eru á bíðilista.

Rodmundur vísir á, at kommunan ikki endaliga hevur tikið støðu til enn, hvussu byggjast skal víðari, tá ið grundøkini, sum enn eru eftir, eru seld, men arbeitt verður við hesum, soleiðis at grundøkjatørvurin kann verða nøktaður innan rímiliga tíð.

## Arbeiði og ansing

Býrðsformaðurin fegnast eisini um nógva og fjølbroytta virksemi, sum er í kommununi, her arbeiði er til allar hendur.

- Her eru fleiri stór arbeiðspláss - ikki minst innn fiskivinnuna, men eisini innan ídnað og handil.

Rodmundur Nielsen sigur, at nýggi barnagarðurin, sum bygdur verður oman fyri Vistarheimið á Mýrum, verður liðugur tíðliga í summar, og við hesum vónar hann, at tørvurin á barnaansing verður loystur.



# Upplagt at Sparikassin er við



*- Sum elsta fyritøka í Føroyum við 170 árum á baki, hevur Føroya Sparikassi royndir út um tað vanliga, tá ið ræður um at veita fíggjartænastur til húsarhaldini, sigur Bjarni Olsen, stjóri*

**- Bústevnan, Hús og Innbúgv í Runavík, er eitt upplagt kjarnuøki hjá okkum, sum hava fíggjað sethús í mong, mong ár. Fyri skjótt 10 árum síðan, fingu vit eisini møguleika at fíggja vinnulív, og í hesum tíðarskeiði hava vit bygt upp ein sakkunnleika, sum ikki stendur aftanfyri nakran annan í Føroyum. Okkara visión er at vera tann brúkaravinarligasti peningastovnurin í Føroyum, sigur Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa**

FÍGGING
*Vilmund Jacobsen*

Bjarni Olsen sigur, at Føroya Sparikassi verður við á bústevnuni, tí júst sethúsafígging hevur verið høvuðsmálið hjá stovninum í teirri longu tíðini, Sparikassin hevur verið virkin.

- Heilt fram til 1994 var sethúsafígging kjarnuøkið burturav hjá okkum. Sparikassin, ið er stovnaður so tíðliga, sum í 1832, hevur 170 ár á baki, og er soleiðis elsta fyritøka í Føroyum. Øll hesi árini hevur okkara høvuðsleiklutur verið at røkja uppsparingina hjá fólki, umframt at veita lán, fyrst og fremst til húsabygging og húsakeyp. Stovnurin hevur tí royndir út um tað vanliga, tá ið ræður um at veita fíggjartænastur til húsarhaldini.

Stjórin vísir á, at Sparikassin í dag eisini er peningastovnurin fyri vinnuna, tí síðan 1994 hava lógarkarmarnir á økinum verið teir somu, sum hjá bankunum.

- Tí kunnu vit í dag veita allar vanligar fíggjartænastur til vinnulívið. Tað merkir, at fleiri av fyritøkunum, sum eru við á bústevnuni, eisini eru viðskiftafólk hjá okkum.

Bjarni sigur, at Sparikassin hesi 10 árini hevur bygt upp ein sakkunnleika, sum ikki stendur aftanfyri nakran annan í Føroyum, tá ið ræður um vinnulívið.

## Sparikassin og bústevnan

- Við atliti til bústevnuna, Hús og Innbúgv, verður í fyrsta lagi hugsað um alt, sum hevur við nýbygging, umbygging ella umvælingar at gera — tekningar, timbur, køkar, hiti, sanitet og el.

Stjórin vísir á, at tá ið fólk fara undir at byggja, er eitt, sum flest øll skulu hava uppá pláss, og tað er fígging.

- At hava hús, er eisini ein spurningur um pengar; tí er tað heilt náttúrligt, at Føroya Sparikassi hevur ein bás á bústevnuni í Runavík.

Bjarni sigur, at hjá teimum flestu er tað størsta peningaliga avgerðin í lívinum at seta fót undir egið borð.

- Tey, sum byggja ella keypa sær egin hús, binda seg nógv, nógv ár fram í tíðina. Tí er tað so umráðandi, at fólk fáa holla ráðgeving um øll viðurskifti í hesum sambandi. Vit vita, hvat tað er at byggja hús. Hjá okkum kunnu fólk fáa ráðgeving, so tey ikki gerast ovfarin av viðurskiftum, sum tey ikki dugdu at ímynda sær, tá tey bygdu. Mintust fólk nú til alt, var kostnaðurin, sum tey settu til køk, baðirúm, hita, el og annað realistiskur?

Stjórin vísir á, at tað eru nógvir tættir, sum skulu fáast at hanga saman, tá ið bygt verður, og tí leggur Sparikassin stóran dent á at veita holla ráðgeving á hesum øki.

## Rentuloft

- Í Danmark er vanligt at hava fasta rentu. Tað merkir, at tey, sum taka lán og byggja hús, undir vanligum umstøðum hava somu rentu langt fram í tíðina. Hevur tú fingið tína fígging, tá ið rentan var lág, stendur væl til. Tað øvuta er galdandi, um tú hevur fingið tína fígging, tá rentan var høg.

Bjarni vísir á, at í Føroyum hava vit skiftandi rentu á sethúsalánum.

- Hetta kann vera ein fyrimunur, tí sethúsarentan lækkar, tá ið rentan fellur. Men hon fer eisini upp, tá ið rentan fer upp.

Føroya Sparikassi var fyrstur av peningastovnunum í Føroyum at bjóða viðskiftafólki eitt sonevnt rentuloft.

- Her kanst tú tryggja teg ímóti, at rentan á tínum sethúsalánum fer longur upp enn t.d. 2% stig upp um núverandi rentustøði. Hevur tú t.d. eitt 1. veðrættarlán, sum í dag er 4,875% um árið, kanst tú keypa eitt rentuloft upp á 6,875%. So leingi, rentan er undir 6,875%, hevur tú galdandi rentu, men fer hon longur upp, fer tín renta kortini ikki upp um 6,875%. Er rentan á ein lágum støði, sum tey flestu meta í dag, og væntar tú, at rentan møguliga fer at fara upp, kann tað vera vert at umhugsa at keypa eitt rentuloft, sigur Bjarni Olsen.

## Aðrar fíggjartænastur

Sparikassin hevur ikki bara innlán og sethúsalán at bjóða upp á.

- Vit kunnu sjálvsagt veita allar aðrar fíggjartænastur, sum húsarhald — og fyri tað eisini vinnur — hava fyri neyðini. Her hugsi eg eitt nú um billán, nýtslulán, gjaldsmidling, pensiónsráðgeving, virðisbrævaráðgeving og fíggjarognarrøkt.

Stjórin sigur, tey vitjandi á básinum hjá Spari-kassanum fáa nærri at vit um allar tær tænastur og møguleikar, sum stovnurin hevur at bjóða, bæði verandi og komandi viðskiftafólkum.

- Alt hetta krevur ráðgevar við góðum førleikum. Tí leggja vit stóran dent á at útbúgva okkara starvsfólk, so tey altíð eru før fyri at veita holla ráðgeving.

Eitt er so tann fakligi førleikin, ið Sparikassin leggur stóran dent á.

Bjarni Olsen sigur, at stovnurin hevur sum sína visión at vera tann brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum.

- Tí leggja vit eisini alstóran dent á, at okkara starvsfólk duga at fara við fólki, so tey kenna seg væl viðfarin og kenna, at tey fáa eina seriøsa viðgerð, tá ið tey samskifta við deildirnar kring landið.

Føroya Sparikassi, sum verður millum framsýnararnar á bústevnuni, Hús og Innbúgv, er ein fyritøka í stórari og støðugari menning.




*Deildin hjá Føroya Sparikassa í Saltangará. Nógv virksemi er á eysturarminum á Skálafjørðinum, og tí hevur Sparikassin valt at hava eina lutfalsliga stóra deild í Runavíkar kommunu*